# JFK-Open 2.og 3.des 2017

## KBF og BSF

Bjóða hervið til 3. umfar av Grand Prix kappingini í

**U-11, U-13, U15, U17 og vaksin sum verður í Klaksvík.**

**Tíð og stað:**

**Børn og ung: Byrjað verður kl 09:00. U11, U13, U15, og U17 spæla í Badmintonhøllini og í KÍ høllini í Klaksvík, leygardagin 2. desember.**

**Vaksin: Spæla sunnudagin 3. desember í Badmintonhøllini, Byrjað verður kl. 13:00.**

**Tíðarætlan og kappingarskrá: verður at síggja á www.bsf.fo frá hóskvøldinum 30.november kl. 22:00**
**Fyri at seinkingar ikki skulu koma í, skulu øll møta til tíðina, minst 30 min áðrenn fyrsta dyst. ( Hygg á BSF.FO seint fríggjakvøldið, tí broytingar koma møguliga í, av avboðum v.m.)**

**Greinar**:

Einmansleikur, (gentir og dreingir spæla hvør sær, har nokk av leikarum eru í sama bólki ). Meldið til í:

| | | |
|---|---|---|
| U11 | A, B, C ella D | (følld 2007 og seinri) |
| U13 | A, B, C ella D | (fødd 2005 og 2006) |
| U15 | A, B, C ella D | (fødd 2004 og 2003) |
| U17 | A,B ella C | (fødd 2002 og 2001) |
| Vaksin | A, B ella C | (13 ár og eldri) |

(BSF tilskilar sær rættin til at sláa bólkar saman, um ov fá melda til).

Nýggir spælarar byrja í bólki D, og spælarar flyta upp, tá teir hava vunnið nóg nógv stig sambært reglum hjá BSF. Les meira um Grandprixkappingina á heimasíðuni hjá BSF.

**Reglugerð** Spælt verður sambært "DBF´s turneringsreglement." (Tó verður møguliga spælt til færri enn 21 stig) Kappingin verður skipað sum “pool/cup” kapping, treytað av luttakaratalinum. BSF tilskilar sær rættin til at gera seedningar. (vanliga 2 spælarar). Lesið meira um Grand Prix kappingina á **www.bsf.fo**.

**Heiðursmerki:** Spælt verður um heiðursmerki í øllum bólkum.

**Gjald:** Leygardagin (U-11, U-13, U-15, U-17): **kr. 50,-** Sunnudagin (vaksin): **kr. 100,-**
(Peningurin skal gjaldast í høllini á kappingardegnum)

**Tilmelding:** Til egið felag,sum so sendir felags tilmelding til kbf@kbf.fo í seinasta lagi fríggjadagin 24. nov, kl.22:00.

**Avboð:** Ber ikki til at møta til kappingin (til dømis vegna sjúka), verða tit vinarliga biðin um at melda avboð via sms til:

**tlf 256018 (Urbanus Olsen )**

**Ábyrgd fyri kappingarskrá: BSF: Kappingarnevndin hjá BSF**

**Kappingarreglur og góður atburður**

*Á vøllinum :*

- *íðkarar døma á egnum vølli og virða avgerðir hjá mótspælara*
- *Íðkarar døma sum teir sjálvir síggja, er ivi verður bólturin givin mótspælara ella spældur umaftur*
- *At rópa ella at kasta við ketjara er ikki loyvt*
- *Ein kann væl vísa gleði og nøgdsemi yvir gott spæl*
- *Vís virðing fyri veikari spælara, at baktala er ikki gott*
- *Eggja viðleikara og gev rós, niðurgerðing gevur tap*
- *Íðkarar takka pent fyri dystin um hann er vunnin ella taptur*

*Uttan fyri vøllin:*

- *Venjari/foreldur/verjar/áskoðarar blanda seg ikki uppí meðan dysturin verður spældur*
- *Venjari/foreldur/verjar/áskoðarar blanda seg ONGANTÍÐ uppí um ein bóltur er inni ella úti*
- *Venjari /foreldur/verjar, hjálpa og geva góð ráð, tá ið pausir eru í einum dysti, um spælt verður uppí 21, kunnu góð ráð gevast tá komi er upp til 11*
- *Um klappað og heppað verður, gevur tað vilja at vinna, men virðing skal eisini vísast mótspælara*
- *Tað er niðurgerandi at klappa um mótspælari ger feil*
- *Teljarar eru bara teljarar og ikki dómarar*
- *Teljari og spælari kunnu koma frá sama felag, um teljari virðir hesar reglur*